# Hátí›arhald í Kollafir›i

**Í gjár hátí›arhildu kollfir›ingar, at tríati ár eru li›in, sí›an skúlin var› vígdur**

HÁTÍ›ARHALD
*Edvard Joensen*



**Kollafjør›ur:** Børnini í Kollafir›i vóru í gjár í 30 ára fø›ingardegi hjá skúlanum. Millum gestirnar vóru Trølla Pætur og klovnar.

Ta› var ikki vanligur skúladagur sum so í Kollafir›i í gjár. Skúlin hev›i avgjørt, at dagurin skuldi haldast eitt sindur ø›rvísi enn vanligir dagar.

Skúlin skipa›i fyri hugnaløtu í skúlanum fyri skúlabørnunum. Millum anna› var Kári Sverrisson í skúlanum og sang fyri børnunum. Bor›reitt var› vi› kaka og bollum, sum foreldur høvdu lati›. Tey vóru eisini vi› í skúlanum og hjálptu til undir sjálvum tiltakinum, sigur Karin Hammer, skúlastjóri í Kollafir›i. Skúlastovurnar vóru pr‡ddar vi› ballónum í ymsum litum, sum lærarar á skúlanum høvdu siti› og blást upp.

Næmingar, sum fyrr hava gingi› í Kollafjar›ar Skúla, fingu høvi at síggja seg sjavan aftur á myndum, sum tiknar eru av flokkunum, i› hava gingi› í skúlanum hesi árini. Hesar myndirnar vóru hongdar upp í skúlanum, og kundi so almenningurin koma framvi› og síggja tær.

Seinnnapartin skipa›i Kollafjar›ar bygdarrá› fyri ymsum tiltøkum fyri tey yngru børnini í bygdini. Ta› vil siga børnum, sum ikki eru farin í skúla enn. Hildi› var, at tey eisini eiga at læra skúlan at kenna, á›renn tey skulu brúka hann dagliga, so bygdarrá›i› bey› teimum til ymisk upplivilsi í skúlanum. Her var ta›, at millum onnur Trølla Pætur og klovnarnir undirhildu.

Í gjárkvøldi skuldi so vera hugnaløta í fimleikarhøllini vi› ymsum til undirhalds. Millum anna› ein filstubbi, sum tikin var› upp, tá flutt var í skúlan í 1970.

Ta› ganga í løtuni 134 børn í Kollafjar›ar Skúla. Frá fyrsta til sjeynda flokk. Tá kollfir›ingar fara í framhaldsdeildina, fara tey til Havnar. Tey fara í Eysturskúlan.

Fyrr gingu kollafjar›arbørn í Felagsskúlanum á Oyrarbakka. Men eftir at Kollafjør›ur hevur lagt saman vi› Havnini, fara tey til Havnar at ganga í framhaldsdeildina. Fyrsti flokkurin byrja›i eftir summarfrítí›ina í ár. Tey, sum í ár ganga í níggjunda flokki, eru á Oyrarbakka. Tey eru tey seinastu, sum fóru tann vegin og sleppa at gera seg li›ug har.

Annars letur Karin Hammer, skúlatjóri, at, at skúlin er ov lítil til næmingatali›. Eitt sindur ver›ur bøtt upp á ta›, nú ítróttarhøllin ver›ur bygd oman fyri skúlan. Tá ver›a samstundis nakrar serstovur bygdar, sum skúlin skal brúka.

Karin Hammer sigur, at skúlin í grundini longu var ov lítil, tá hann var› tikin í brúk fyri 30 árum sí›an. So longu tíggju ár seinni, í 1980, var› bygt uppí. Og nú er aftur ov trongt.

Men kortini leggur skúlin høli til læknavi›talu, sigur skúlatsjórin, og dylur ikki fyri, at hon fegin vildi havt tey hølini til skúlabrúks, og at læknin fekk onnur høli.

## N‡ggj fer›aætlan




**N‡ggja fer›aætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins er komin. Størsta broytingin í mun til gomlu ætlanina er, at flogrutan stendur fyri seg**

FER‹AÆTLAN

N‡ggj fer›aætlan, sum er galdandi frá 1. november 2000 til 31. oktober 2001, er komin.

N‡ggja fer›aætlanin líkist rættiliga nógv teimum undanfarnu. Størsta broytingin er, at flogrutan er fyri seg, og at permuliturin hesafer› er grønur.

Flogrutan millum Farstø›ina á Bursatanga og flogvøllin í Vágum hevur í n‡ggju fer›aætlanini fingi› egi› pláss á sí›u 22. Eitt anna›, sum n‡tt er í hesum sambandi, er at í n‡ggju fer›aætlanini eru frámerki, sum vísa, hvat flogfar ta› er, rutan koyrir í samband vi›. Aftast á sí›uni eru ávikavist búmerkini hjá Atlantsflog og Maersk Air, sum vísa flogsambandi›.

Í a›rar mátar eru ikki tær stóru broytingarnar at síggja solei›is í fyrsta eygnakasti. Smyril fer til Vágs eina fer› um vikuna, og Tróndur gamli er ikki so at sleppa av vi›. Hann siglir enn sum á›ur um Skopunarfjør› og út í Hest.

Men bussarnir koyra framvegis, sambært fer›aætlanini hjá Strandfarskipum Landsins, úr Skálabotni. Ta› skal, eftir hvat sta›kend fólk og gomul landalæra siga, ver›a Skálafir›i.

**ej**

# N‡ggj bilhús til sjúkrabilarnar

**Sjúkrabilarnir á Landssjúkrahúsinum í Havn fáa n‡ggja útkoyring og n‡tt bilhús. Ta› lættir nógv um og ger, at bilarnir kunnu koma skjótari á sta›i›**

SJÚKRABILAR
*Stefan í Skorini*

Arbei›i› vi› at gera n‡tt bilhús er fari› í gongd, og menn hava fylt teir fyrstu formarnar vi› betongi. Bilhúsi› ver›ur eini 200 fermetrar til víddar. Samstundis sum n‡tt bilhús ver›ur bygt, fáa sjúkrabilarnir eisini n‡ggja útkoyring.

Alt hetta fer at lætta um arbei›i› hjá portørunum á Landssjúkrahúsinum. Nú koma sjúkrabilarnir beint út á høvu›svegin á Frælsinum. Fyrr skuldu bilarnir fyrst afturum bygningin hjá Almanna- og Heilsumálast‡rinum, á›renn fer› kundi setast á sjúkrabilin á høvu›svegnum. Henda útkoyringin var eisini naka› smøl, tá talan er um bráfeingis sjúkraflutning.

Fyrimunurin er eisini, at á›ur komu sjúkrabilarnir út á Frælsi› mi›skei›is í brekkuni, og ta› kann vera ke›iligt í hálku. Har útkoyringin er nú, er vegurin slættur.

Fari› var› undir arbei›i› fyri stuttum, og ætlanin er, at ta› skal vera li›ugt á›renn jóltí›ir. Peningur var› annars játta›ur í fjør, men arbei›i› byrja›i ikki fyrr enn nú eftir summarfrítí›ina.

Sjúkrabilarnir hava sta›i› ni›ast í Almanna- og Heilsumálast‡rinum, men ta› er nú innrætta›, og sjúkrabilarnir fáa sítt egna hús at standa í.

Nógvir bilar hava altí› sta›i› á økinum, har sjúkrabilarnir hava sta›i› parkera›ir, tí hetta hevur veri› parkeringsøki hjá øllum teimum, sum hava havt sína dagligu gongd í bygninginum hjá Almanna- og Heilsumálast‡rinum.

Privatbilar hjá fólki skulu framvegis koyra inn aftanfyri, um tey ætla at seta bilin har, tí alt er lagt solei›is til rættis, at eingin gjøgnumkoyring ver›ur, har sjúkrabilarnir standa. Bilhúsi› ver›ur bygt út ímóti vegnum.

Allir sjúkrabilarnir skulu nú standa inni í bilhúsinum, so portørarnir sleppa frá at leita eftir nøkrum av bilunum undir kavanum, tá hann fellur um oyggjarnar.



*Skjótt fer n‡tt bilhús á 200 fermetrar til sjúkrabilarnar at standa her. N‡ggja útkoyringin og bilhúsi› fara at lætta um arbei›i› hjá portørunum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Kirkjulig villei›ing



*- Um vit liva ví›ari sum um einki var hent, so gó›taka vit ta› sum hendi á hvítusunnu. Og vit gó›taka harvi› eisini eina villei›ing av kirkjufólkinum. Uppgeva vit strí›i›, so ver›a vit eisini sek í ranglæruni, sigur Petur O. K. Olofson. Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Fólkakirkjan er á veg aftur til hei›inskapin og lei›ir fólk í fortapilsi, sigur Petur O. K. Olofson. Hann vi›ger í n‡ggjum bóklingi avlei›ingarnar av donsku bispavitjanini á hvítusunnu**

KIRKJUSTRÍ‹
*Ey›un Klakstein*

Føroyska fólkakirkjan villei›ir fólk, tí hon loyvir umbo›um fyri Sodoma og Gomora inn í kirkjuna at prædika.

– 11 danskir bispar hava innført Sodoma og Gomorra í fólkakirkjuni, og teir eru tí umbo› fyri Sodoma og Gomorra. Tá hesir bispar fáa loyvi at virka í kirkjunum í Føroyum, eru tey, sum loyva teimum ta›, vi› til at villei›a fólk. Tey taka harvi› undir vi›, at Sodoma og Gomorra kunnu vera ein partur av eini kristnari kirkju.

Hetta heldur teologurin og fyrrverandi presturin, Petur O. K. Olofson.

Hann ger í einum n‡ggjum bóklingi stø›una upp, eftir at ein tí› er fráli›in, sí›ani teir donsku bisparnir vóru á vitjan í Føroyum í sambandi vi› 1000 ára haldi› fyri kristnanina av Føroyum.

– Føroyska fólkakirkjan ver›ur til eina sekt, sum villei›ir fólk, sigur hann.

Olofson vísir á, at ta› er í strí› vi› Bíbliuna, at fólk, sum taka undir vi› samkyntum paralagi, sleppa at prædika í kirkjuni. Men ta› var júst ta› sum hendi, tá teir donsku bisparnir fingu loyvi at halda gudstænastur ymsasta›ni í Føroyum annan hvítusunnudag.

– Vi› at loyva hesum bispum inn í kirkjuna at prædika vi›virkar føroyska fólkakirkjan til forføra fólk, sigur Olofson.

### Strí›i› um bisparnar

Í n‡ggja bóklinginum, sum Olofson hevur skriva›, grei›ir hann frá tí strí›i› sum var, tá teir donsku bisparnir skuldu til Føroya at halda gudstænastur annan hvítusunnudag.

Stórt strí› var um hetta, tí f‡ra føroyskir prestar vildu ikki hava donsku bisparnar í sína kirkju at prædika. Orsøkin til ta› var, at donsku bisparnir taka undir vi›, at samskynt fólk skulu kunna markera sítt paralag vi› eini hátí›arløtu í kirkjuni.

Føroysku prestarnir vístu á, at samkynt paralag er í strí› vi› skriftirnar, og tí skal kirkjan á ongan hátt ver›a vi› í hesum. Bisparnir, sum taka undir vi› at loyva teimum samkyntu inn í kirkjuna, hava tí einki at gera í føroysku kirkjunum, søgdu teir f‡ra prestarnir.

Endin var tó, at allar teir donsku bisparnir prædika›u í føroyskum kirkjum, og ta› er hetta sum ger, at Petur O. K. Olofson nú ger stø›una upp.

### Kirkjan villei›ir

Olofson sigur, at bispur og teir 15 føroysku prestarnir, sum tóku undir vi›, at teir donsku bisparnir kundu koma í føroysku kirkjurnar at prædika, harvi› siga gott fyri, at teir donsku bisparnir, sum førføra og villei›a fólk, kundu ver›a ein partur av fólkakirkjuni.

– Guds or› sigur púra greitt nei til at fólk skulu liva sum samkynt. Tá so teir donsku bisparnir taka undir vi›, at kirkjan skal hátí›arhalda samkynt paralag, so gerast teir til umbo› fyri Sodoma og Gomorra, og tá seta teir seg harvi› uttan fyri tí kristnu kirkjuna, sigur Olofson.

– At hesir bisparnir sí›ani sleppa inn í føroysku kirkj-urnar at prædika ger, at eisini tann føroyska fólkakirkjan tekur undir vi› eini villei›ing av fólkinum, sigur hann.

Olofson sigur, at kirkjan kann ikki liva lívi› fyri fólk, men hon skal ver›a eitt ljós og vísa fólki rætta vegin sambært skriftunum.

– Men sum gongdin er nú, er fólkakirkjan er á veg aftur til hei›inskapin og lei›ir fólk í fortapilsi, sigur Olofson.

### Mugu strí›ast ímóti

Petur O. K. Olofson sigur, at orsøkin til, at hann hevur skriva› bóklingin er, at ta› er ney›ugt at gera stø›una upp.

– Um vit liva ví›ari sum um einki var hent, gó›taka vit ta› sum hendi á hvítusunnu. Og vit gó›taka harvi› eisini eina villei›ing av kirkjufólkinum. Uppgeva vit strí›i›, ver›a vit eisini sek í ranglæruni, sigur Olofson.

– Ta› sum teir dosku bisparnir gera, vi› undirtøku frá bispi og 15 føroyskum prestum, er ein svikager› ímóti Guds or›i. Sjálvandi vilja teir, at vit skulu halda fram sum um einki var hent, men ta› gera vit ikki.

Danski presturin, sum er búsitandi í Klaksvík, sigur, at hann hevur skriva› bóklingin, sum kallast »Bispebesøget« fyri at grei›a fólki frá, hvat ta› í grundini var, sum hendi á hvítusunnu, og hvat Bíblian sigur um ta›.

Bóklingurin finnist í umlei› 2000 eintøkum og fæst frá ymsum fólki í landinum. Hann er ikki til keyps í bókabú›unum.

Langan leygardag eru hesi tilboð

Køksrullustativ
BODUM
Nú 130,00

3 Glasskálir
Sett BODUM
Nú 148,00

Uppvaskistativ
stál
Nú 67,00

Skeribretti
v/knívi
Nú 98,00

Varmafløskur
Nú 29,50

6 víngløs
Nú 29,50

PF. VALDEMAR LÜTZEN
Vágsbotnur - Tlf. 31 16 75

Sosialurin - 31820